Vælkomin til dyst í Sarpugerði

# ÍF – FC Suðuroy

hósdagur 25. juni 2015




Minst til limagjaldið!
Sí http://www.if.fo

Mynd: Jens Kristian Vang

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
*ábyrgdarblaðstjóri*

## Vælkomin til Effodyst í Sarpugerði, her FC Suðuroy eru komnir á vitjan.

Vit spældu her seinasta umfar eisini, og megnaðu vit einans at fáa javnleik móti AB, sum liggja næstniðast og hava ongan dyst vunnið enn. Úrslitið gjørdist 3-3 eftir at vit vóru aftanfyri 0-2 í hálvleikinum, og eisini 1-3 eitt skifti í seinna hálvleiki. So traðkaði okkara garvaði liðformaður, Bartal Eliasen, í karaktér og legði upp til 2-3 og javnaði til 3-3 sjálvur og høvdu vit havt meir tíð, so hevði hann helst eisini sett trumf á.

Hetta málið var hansara mál nummar 100 fyri besta liðið hjá ÍF, so tað kundi ikki gerast uppá eitt betri tíðspunkt. Men vit kunnu til stuttleikar nevna, at hetta kanska var hansara mál nr 101, tí sæmbært okkara keldum, skoraði hann sítt mál nr 100 móti Víkingi í Fuglafirði, fyrr í ár, í minniligu fjórðingsfinaluni um Løgmanssteypið. Ikki so galið at hava ein verjuskansa, sum skorar so nógv at hann hevur mist talið.

Seinast vit spældu móti FC Suðuroy gekst ikki serliga gott hjá okkum, har vit máttu lúta



fyri teimum fyri fyrstu ferð. So vit hava eitt at gera, og tað er at fáa fulla úrtøku í dag, um vit ætla at sleppa uppí ovaru helvtina av stigatalvuni. Hetta er seinasti dysturin áðrenn summarsteðgin, og fer ein sigur í dag at gera steðgin væl betri.

Nú er at vóna at úrslitið í seinasta umfari, har FC Suðuroy tapti heima móti Víkingum, verður við til at temja suðringarnar her, nú vit hava lænt Víkinga-vøllin, meðan graslíkið í Fløtugerði verður skift. Væntandi er tað arbeiði liðugt til Varmakeldustevnuna 4.juli.

*Góðan dyst*
*Koyri á dreingir*

Fyrr í á gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 9 | 03-05-2015 | ÍF-FCS | 2-3 |

Í 2012 gekk soleiðis
*(FCS vóru í 1.deild í 2013 og 2014):*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 9 | 20-05-2012 | FCS-ÍF | 0-6 |
| 17 | 27-07-2012 | ÍF-FCS | 3-2 |
| 26 | 29-09-2012 | FCS-ÍF | 1-4 |

Í 2010 gekk tað soleiðis
*(FCS vóru í 1.deild í 2011):*

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 | 13-05-2010 | ÍF-FCS | 2-0 |
| 16 | 27-07-2010 | FCS-ÍF | 0-3 |
| 20 | 29-08-2010 | ÍF-FCS | 3-1 |

**ÍF FÓTBÓLTUR**
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

**LEIKSKRÁIN:**
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: NiNG - Tel 215 315



HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# TIPPIKAPPING

Sum nakað nýtt, so fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á leikaranum, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur.

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| EB/Streymur | KÍ | | | | |
| AB | NSÍ | | | | |
| Víkingur | TB | | | | |
| B36 | ÍF | | | | |
| HB | FC Suðuroy | | | | |
| Navn: | | | | | |
| Telefonnummar | | | | | |


NORÐOYA SPARIKASSI

Saman finna vit bestu loysnina
- Vælkomin til eitt kundaprát í sparikassanum

Ynskir tú at hoyra nærri um hvørjar tænastur vit kunnu bjóða tær. Alt frá barnasamansparing, billáni, bústaðarláni, pensjónssamansparing og aðrar fíggjarmøguleikar ella kanska vegleiðing til at nýta netbankan, ert tú vælkomin til eitt kundaprát í sparikassanum




Bílegg eitt kundaprát
á tel. 47 5000

Norðoya Sparikassi Ósávegur 1 Postboks 149 FO-710 Klaksvík Tel. 47 5000 Fax 47 6000 ns@ns.fo www.ns.fo





fk

Fuglafjarðar
Keypssamtøka

tel 660020
fax 444895 | far 217095

Opið er mánadag - leygardag frá kl. 9 - 22
Sunnudag er stongt!

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar



Linde Gas ] AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

**Opnigstíðir:**
Mána. - Fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

**www.gassola.fo**







**Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.**

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**

# TIPS 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Fimm teir fyrstu spurningarnir eru um viðkomandi leikara, ið verður spurdur, í meðan teir írestandi átta, eru vanligir fótbótlsspurningar. Í teimum fyrstu 5 spurningunum fær leikarin hálvt minusstig, um hann ikki hevur rætt svar. Annars telur rætt svar 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin situr"-leistinum og skal taparin, so senda víðari til næsta mann/kvinnu í røðini.

Martin vann á Poul seinast, sum sendi fakkilin víðari til Áka. Martin og Áki fingu møguleikan at vedda, men tóku ikki av. Martin vísir seg at verða tungur at koppa, og í dag bleiv tað til enn ein sigur, sum hesuferð var 8-4,5. Áki sendi fakkilin fram eftir vøllinum, har vongurin Andy tók í móti. Andy og Martin koma so at dystast í 20. umfari, sum verður 9. august, tá EB/Streymur kemur at vitja . Samlaða støðan er sostatt 6-3 til fjeppararnar í móti leikarunum.

Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | ÁP | MMH |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Áki hevur havt blusu nummar 2 í nógv ár. Hvat nummar hevði hann í sínum fyrsta árið á besta liðnum? | 2 | 18 | 20 | 1 | 1 |
| 2 | Hvør var nummar 2 áðrenn Áki? | Janus E. Petersen | Tomasz Przybylski | Hjalti Lundsbjerg | -0.5 | 0 |
| 3 | Hvussu nógvar U-landsdystir er Áki skrásettur fyri | 5 | 7 | 9 | -0.5 | 1 |
| 4 | Í móti hvørjum skeyt Áki sítt fyrsta mál fyri besta liðið hjá ÍF? | TB | VB | Sumba | -0.5 | 0 |
| 5 | Um hugsað verður um tal av dystum, hvat er so besta árið hjá Áka? | 2007 | 2010 | 2011 | 1 | 1 |
| 6 | Hvussu nógvar dystir er Magni á Lakjuni skrásettur fyri á besta liðnum hjá ÍF? | 83 | 93 | 103 | 0 | 1 |
| 7 | Hvussu æt bókin, sum Stig Tøfting gav út í 2012? | No regrets | Plæne-klipperen | Bankbogen | 0 | 1 |
| 8 | Hvør var nummar 3 á assistlistanum í La Liga í ár? | James Rodriguez | Luis Suarez | Nolito | 0 | 0 |
| 9 | Hvør er høvuðsstuðul hjá donsku superliguni? | SAS | Alka | Carlsberg | 1 | 1 |
| 10 | Hvørjir vóru málskjúttarnir, tá Føroyar spældi minniliga 2-2 javnleikin móti Slovenia 3. september 2000? | John Petersen og Hans Fróði Hansen | Todi Jónsson og Øssur Hansen | Uni Arge og Øssur Hansen | 1 | 1 |
| 11 | Hvør er venjari hjá franska fótbóltslandsliðnum? | Didier Deschamps | Claude Makelele | Bixente Lizarazu | 1 | 1 |
| 12 | Nær fór Jan Mølby úr Liverpool? | 1994 | 1995 | 1996 | 0 | 0 |
| 13 | Hvussu eitur staðið, har Skála spælir sínar heimadystir? | Á Mýruni | undir Mýruhjalla | oman á Mýru | 1 | 0 |
| | Tilsamans | | | | 4.5 | 8 |

Rætt svar: x - 1 - 2 - x - 2 - 2 - 1 - 1 - x - 2 - 1 - 2 - x






KJ HYDRAULIK veitir
• Tvíkiljur
• Aliringar
• Alibesløg
• Iveco motorar
• Palfinger sjókranar
• Kapstanar og spøl
• og mang annað
Vit hava á goymslu:
Vit eru sølu- og tænastuumboð fyri:
Fjølbroyttur veitari til vinnuna
KJ HYDRAULIK er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastu til alivinnuna, skipaflotan, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna.
PALFINGER
PALFINGER MARINE
HYUNDAI
Set teg í samband við okkum í Havn ella á Kambsdali, ring 40 70 00
KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL
Kambsdalur: Postsmoga 110 / Tórshavn: Mykinesgøta 5 · Tel 40 70 00 · Faks 40 70 01 · info@kj.fo · www.kj.fo


Vit gera
– vegir
– gongubreytir
– tún
– parkeringsøkir o.a.
Vit planera og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179




Restaurant Muntra
STUÐLAÐ ÍTRÓTTINUM
OG MENTANARLÍVINUM Í
FUGLAFIRÐI SÍÐAN 1972
FO-530 FUGLAFJØRÐUR
TLF. 444081 · 444039
FAX 444954 · FAROE ISLANDS


Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið
SK
SVENDKROSSTEIN
Pf. Svend Krosstein · Falkavegur 6 · Postboks 3229 · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 · Fax +298 344 601 · www.krosstein.fo · krosstein@krosstein.fo
SENDISTOVAN

# Leikarin í dag:



Navn: .......................................... Fritleif í Lambanum
Føðingardagur: .......................... 13/4-1986
Føðistað: ...................................... í Havn. (ikki í klubbagarðinum alíkavæl,
............................................................ men á LS)
Starv: .......................................... Haldi skil á Gutta og teimum á Havsbrún
Pláss á vøllinum: ....................... Hehe
Yvirtrúgv: ................................... Nei, einki haldi eg
3 orð sum lýsa teg: ................... Fittur, hyggeligur og rímiligur.
Torførasti mótstøðumaður: ....... Clayton
Frítíðarítriv: ............................... Ikki nakað serligt
Vónir fyri 2015: ......................... At Áki fær damu

## Tín Ítrótt:

Fyrsti dystur á 1.liðið: Tað var í 2003.
Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF: Tá eg var um 6-7 ár.
Aðrar ítróttargreinar: Pubquiz saman við fætter og teimum, á johns.
Minningarríkasti dystur: Hinaferð tá Jens Kjartan bleiv innskiftur, og datt.
Størstu fótbóltsliga ávirkan: Abraham Løkin var fantastiskur. Annars Samson eisini.
Besti fótbóltsleikari: Eg tími illa at skriva Messi, men tað er nokk hann.
Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt: Kúluvarp
Hvat slag av venjing dámar tær best: Spæl uppá 2 mál.
Hvat slag av venjing dámar tær ikki: At jungelera og sovarit tvætl.

## Tínir favorittar:

Matur og drekka: Dunnan hjá mammu á jólum, sodavatn afturvið.
Slag av tónleiki: Alt
Sjónvarpssending: Game of thrones
At slappa av: At fara forbíð hjá Ólavi Larsen til ein kaffimunn.
Troyggja nr.: 5
Besti fótbóltsleikari nakrantíð: Zidane.
Sjónvarp/filmstjørna: Leonardo DiCaprio.
Besta bók/blað: Einki boð.
Stuttligasti persónur: Eyðun Ryggshamar og Elin Løkin.
Stuttligasti í ÍF hópinum: Karl ella Andy.
Besti ÍF áskoðari: Samson í Lambanum og Elfrida Hansen.

## Leikarafakta:

- Hevur umboðað U17, U19 og U21 landsliðini tilsamans 13 ferð. Hesir dystir hava kastað 2 gul og eitt reytt kort av sær.
- Er í dag fjeppari av Manchester United, men sum yngri var hann fjeppari av Aston Villa eitt tíðarskeið.
- Er í ár liðskipari fyri aðru ferð. Fyrru ferð, hann var liðskipari, var ein part av 2008 kappingarárinum.
- Skeyt síðsta mál á gamla vøllinum, sum var skiftur í 2003, og var sera nær við at skjóta síðsta mál á vøllinum, sum í skrivandi løtu verður skiftur í Fløtugerði. Adeshina Lawal fekk skorað til 2-0 í yvirtíðini í sigrinum móti TB 31. mei.
- Kom á besta liðið í 2003.
- Hevur umboðað okkum, NSÍ og Víking.
- Spældi í nógv ár við blusu nummar 8, sum Thomas Asmussen, Bogi Reinert Petersen og André Olsen hava havt síðan hann fór.
- Hevur blusu nummar 5 nú, sum m.a. Jonn Thomsen, Poul Ennigarð og Høgni Madsen hava spælt við.
- Spældi í seinnu hálvu í 2013 við blusu nummar 23.
- Er stóribeiggi Jákup, sum vann eina landsliðsblusu á Facebook-kapping herfyri.
- Av øllum leikarunum, sum Fritleif hevur spælt saman við, hevur Frank oftast verið á sama liði.
- Skorar í miðal hvønn 45. dyst.





## Salong Halda.fo

Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta

Opið er:

| | |
|---|---|
| Mánadag | 9.00 - 17.00 |
| Týsdag | 9.00 - 19.00 |
| Mikudag | 9.00 - 19.00 |
| Hósdag | 9.00 - 18.00 |
| Fríggjadag | 9.00 - 17.00 |
| Leygardag | 9.00 - 13.00 |

Opið er eisini eftir avtalu

Online booking
www.salonghalda.fo



teknistovan GØTA

Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo

Henning Olsen
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo

510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo

## Álvaskot

Fysioterapi
v/Álvur Hansen

445144

## Krana- & lastvognskoyring

Maskinur & Amboð

v/ Poul Joensen
Tlf. 21 31 95

pouljo@olivant.fo
Svarar alt døgnið





BANKNORDIK

NordikPENSJÓN

**Alt, sum tín pensjón eigur at vera**

› www.banknordik.fo/pensjon



j+h BETONG
✆ 22 20 15

## SANDGREVSTUR

1949



Bakkavegur 32 • FO-530 Fuglafjørður • Faroe Islands
Phone +298 445000 or +298 595900 • www.sandship.fo








VØRUHÚSIÐ
TEL 54 25 00




**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

# Kvinnufótbóltur

## Hæddarpunktið innan kvinnufótbólt í Fuglafirði var Føroyameistaraheitið í 1991




*Kvinnuliðið, sum í 2013 var í steypafinaluni móti KÍ*
*Standandi fv: Thurid, Randi, Dania, Jacoba, Mary-Ann, Rósa, Erla (liðskipari), Mirjam H, Mirjam D, Durita B. N., Durita N (venjari), Durita R og Alex (venjari)*
*Húkandi: Kára, Jónfríð, Jóhanna, Sigrid, Hanna, Jenny, Marta og Kristina*

Tað hevði gingið gott nøkur ár framman undan og toppaði í 1991, men longu árið eftir fluttu vit niður og eftir tað hevur tað verið heltur strilti í bestu deildini. Men miðskeiðis í 2000 byrjaði at ganga betur. Við Malenu Hansen á odda fingu vit aftur kvinnulið í bestu deildini. Í 2013 vóru vit við Duritu Djurhuus sum venjara í steypafinaluni ímóti KÍ - og taptu.

Í 2014 og 2015 hava vit verið saman við Víkingi um felagsliðið ÍF/Víkingur. Samstarvið er um 1.deild og 2.deild. Vænt verður í báðum støðum og heimadystirnir verða deildir millum bygdirnar.
Tað er ein avbjóðing at fáa slíkt samstarv at rigga. Mentanin í feløgunum er ymisk og felagsumstøðurnar í Fuglafirði eru ikki eins góðar sum í Gøtu.

Í ár er Erik Nielsen venjari. Úrslitini hava verið misjøvn. Bert fimm lið eru í deildini og eru okkara fjórfremst - aftanfyri KÍ, EB/Streym/Skála og HB og frammanfyri AB/B36.

Í ár eru bert tríggjar fuglafjarðargentur á besta liðnum. Hanna Poulsen, Marta S Thomsen og Sigrid Petersen. Hinvegin eru vit væl umboðarar á næstbesta liðinum.






















ASKUR eitur nýggja limaskipanin hjá ÍSF, sum alt fleiri feløg nú brúka. ÍF hevur nú knýtt seg upp í skipanina, og hetta merkir, at allir limir skulu gjalda limagjald og/ella skráseta limaskap umvegis nýggju skipanina á hesi síðuni.

Nýggja skipanin hjá ÍSF hevur til endamáls at skráseta øll ítróttafólk í Føroyum, og tá spælarar í ÍF gjalda limagjaldið og/ella skráseta limaskapin her, eru teir samstundis skrásettir sum íðkandi undir ÍSF – og sjálvandi eisini sum limir í ÍF.

Við nýggju skipanini verður ikki longur møguligt at gjalda limagjald og/ella skráseta limaskap við vanligari flyting umvegis bankan. Nógv umsiting hevur verið av tí, og nú øll gjøld fara um nýggju skipanina, lættir tað munandi um hjá felagnum umsitingarliga.

Vónandi lættir nýggja skipanin eisini um hjá foreldrum og spælarum, sum skjótt og lætt kunnu gjalda limagjøldini og skráseta limaskapirnar her. Felagið heitir á øll um at gjalda limagjald og skráseta limaskap nú! Tá limagjaldið er goldið, og limaskapurin skrásettur, er spælarin eisini limur í tryggingarskipanini hjá ÍSF.

Sí meira á www.if.fo

# HAGTØL

FAROE SHIP

## HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| 6/25/15 | ÍF-FC Suðuroy |
| 6/26/15 | AB-B36 |
| 6/26/15 | KÍ-NSÍ |
| 6/26/15 | Víkingur-HB |
| 6/27/15 | TB-EB/Streymur |

## KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 7/27/15 | EB/Streymur-KÍ |
| 7/27/15 | AB-NSÍ |
| 7/27/15 | Víkingur-TB |
| 7/28/15 | B36-ÍF |
| 7/29/15 | HB-FC Suðuroy |

## TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Nr | Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|---|
| | Klæmint A. Olsen | 16 | NSÍ |
| | Finnur Justinussen | 11 | Vík |
| | Andreas Lava Olsen | 11 | Vík |
| | Albert Adu | 8 | TB |
| | Hans Pauli Samuelsen | 7 | B36 |
| | Arnbjørn T. Hansen | 7 | HB |
| | Levi Hanssen | 7 | HB |
| | Lukasz Cieslewicz | 7 | B36 |
| | Páll A. Klettskarð | 6 | KÍ |
| | Jákup á Borg | 6 | B36 |

## MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | LK | SK | Tils. |
|---|---|---|---|
| Clayton Soares | 4 | 1 | 5 |
| Kristoffur Jakobsen | 2 | 2 | 4 |
| Andy Ó. Olsen | 3 | 1 | 4 |
| Adeshina A. Lawal | 4 | | 4 |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 2 | 1 | 3 |
| Bartal Eliasen | 2 | 1 | 3 |
| Dánjal á Lakjuni | 1 | 1 | 2 |
| Leivur Joensen | 2 | | 2 |
| Nenad Saric | 1 | 1 | 2 |
| Karl A. Løkin | 1 | | 1 |
| Áki Petersen | 1 | | 1 |
| Fritleif í Lambanum | 1 | | 1 |

## STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 16 | 10 | 3 | 3 | 44 | 22 | 22 | 33 |
| 2 | B36 | 16 | 9 | 6 | 1 | 33 | 17 | 16 | 33 |
| 3 | Víkingur | 16 | 8 | 6 | 2 | 41 | 23 | 18 | 30 |
| 4 | HB | 16 | 8 | 6 | 2 | 25 | 16 | 9 | 30 |
| 5 | KÍ | 16 | 7 | 3 | 6 | 26 | 22 | 4 | 24 |
| 6 | ÍF | 16 | 4 | 7 | 5 | 25 | 25 | 0 | 19 |
| 7 | TB | 16 | 3 | 8 | 5 | 20 | 21 | -1 | 17 |
| 8 | FC Suðuroy | 16 | 4 | 1 | 11 | 21 | 43 | -22 | 13 |
| 9 | AB | 16 | 0 | 9 | 7 | 15 | 27 | -12 | 9 |
| 10 | EB Streymur | 16 | 1 | 3 | 12 | 12 | 46 | -34 | 6 |




# JOHN'S

COFFEE & DRINKS — KARVATOFTIR — FUGLAFJØRÐUR

## TÓNLEIKASKRÁ

**11. APRÍL** JENS TUMMAS NÆSS OG HANS RAVNSFJALL

**18. APRÍL** BRYNJA B. OG HANS ANDRIAS JACOBSEN

**25. APRÍL** EYÐUN NOLSØE

**2. MAI** BLACKSHEEP

**9. MAI** JENS MARNI HANSEN

**16. MAI** SÁMAL RAVNSFJALL

**23. MAI** UNI DEBESS

**30. MAI** FINNUR KOBA

**6. JUNI** GUÐRUN SÓLJA & JANUS KAMPMANN

**13. JUNI** HANS ANDRIAS JACOBSEN

**20. JUNI** SIGNAR Í HOMRUM & JOHN JOHANSEN

FÓTBÓLTUR
PREMIER LEAGUE OG CHAMPIONS LEAGUE

PUBQUIZ
HVØRT LEYGARKVØLD KL. 22

OPIÐ: FRÍGGJADAG 19—04 — LEYGARDAG 17—04 — SUNNUDAG 17—23

FYLG VIÐ Á FACEBOOK / JOHN'S Í FUGLAFIRÐI

## Liðini í dag:

# ÍF – FC Suðuroy

| | |
|---|---|
| 1 | Hallgrím G. Hansen (M) |
| 2 | Áki Petersen |
| 3 | Poul N. Mikkelsen |
| 4 | Sjúrður Jacobsen |
| 5 | Fritleif í Lambanum (L) |
| 6 | Margeir Toftegaard |
| 7 | Dánjal á Lakjuni |
| 9 | Kristoffur Jakobsen |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard |
| 11 | Frank H. Poulsen |
| 15 | Jákup Oluf á Lakjuni |
| 16 | Karl A. Løkin |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento |
| 19 | Levi Jøkladal |
| 20 | Leivur Joensen |
| 21 | Andrias Poulsen |
| 22 | Nenad Saric |
| 23 | Andy Ó. Olsen |
| 24 | Dánjal Pauli Højgaard |
| 25 | John Daniel Guðjónsson |
| 28 | Arnold Kristiansen |
| 30 | Adeshina A. Lawal |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard |
| 38 | Predrag Markovic (M) |
| 76 | Bartal Eliasen |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Aleksandar Jovevic |
| Hjálparvenjari: | Poul Ennigarð |
| Hjálparvenjari: | Eyðun Ryggshamar |
| Hjálparvenjari: | Nunu Ánike |
| Hjálparvenjari: | Jonn S. Thomsen |
| Liðleiðaraábyrgd: | Dan Petersen |

| | |
|---|---|
| 1 | Kári Jacobsen (M) |
| 2 | Christian Ibeagha |
| 3 | Jón Áki Jacobsen |
| 4 | Valerian Iobashvili |
| 5 | Dánjal Godtfred |
| 6 | Heini Bech |
| 7 | Mamuka Toronjadze |
| 8 | Heri E. Kjærbo |
| 9 | Palli Augustinussen (L) |
| 10 | Jón K. Poulsen |
| 11 | Ari K. Poulsen |
| 14 | Búi Egilson |
| 15 | Høgni Madsen |
| - | Rani Johannesen |
| 16 | Rani N. Johannesen (M) |
| 17 | Teitur Mortensen |
| 18 | Tóki Mortensen |
| 19 | John Villi Leo |
| 20 | John Tordar Poulsen |
| 21 | Eiler Brattalíð |
| 22 | Bjartur í Lágabø |
| 23 | Salmundur Bech |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Jón Pauli Olsen |
| Hjálparvenjari: | Bogi Mortensen |
| Liðleiðari: | Uni Egilsnes |
| Liðleiðari: | Frits Poulsen |
| Liðleiðari: | Marni Mohr Leo |

**Dómari:** Rúni Gaardbo
**Hjálpardómarar:** Edvard Højgaard og Johnleif Gerðisá
**4. dómari:** Dia Lamhauge
**Eygleiðari:** Jens M.